Landsstýrið:

# Miðalaldurin er 43 ár



*Nýggja landsstýrið er tað mannsterkasta nakrantíð. Miðalaldurin er 43 ár á nýggju manningini.*

*Mynd: Finnur Justinussen*

**Miðalaldurin á nýggja landsstýrinum er 43 ár. Átta menn og ein kvinna manna tað tjúgunda landsstýrið í røðini, síðani heimastýrið kom í gildi**

LANDSSTÝRIÐ
*Heri á Rógvi*

Hósdagin fingu vit nýtt landsstýrið. Á samkomu í Tinganesi útnevndi løgmaður, Anfinn Kallsberg, tríggjar nýggjar landsstýrismenn. Somuleiðis loysti hann tveir landsstýrismenn úr starvi. Støðan er so tann í dag, at tað eru níggju landsstýrismenn. Hetta talið er samstundis tað hægsta nakrantíð. Til samanbering kunnu vit nevna, at danir hava 23 ráðharrar.

Eisini hava stýrini, sum vórðu stovnsett eftir umfatandi bygnaðarbroytingarnar hjá Finn Norman Christensen, fingið nýggj heiti. Tey eita nú ráð, sum kann umseta til ministerie. Hetta er eitt hægri heitið, men kemur kortini ikki at ávirka umsitingina nakað, verður mett.

Samstundis hava vit nú fingið eitt nýtt ráð, sum ikki var stýri frammanundan, samstundis sum tveir landsstýrismenn aftur hesaferð fara at deilast um eitt stýri/ráð.

Høgni Hoydal verður landsstýrismaður fyri eitt løgmálaráð, sum millum annað skal fáast við lógarmál og kommunumál. Tað nógva av virkseminum fer at snúgva seg um yvirtøkur.

Fyrrverandi almanna- og heilsumálastýrið hevur fingið eina nýggja demensjón. Ikki bara eitur stýrið nú ráð og ein landsstýrismaður Bill og ein annar Páll, men stýrið er bítt sundur. Uttan iva tað mest strævna arbeiðið innan almennu umsitingina liggur úti í gamla Almanna-og heilsumálastýrinum. Trupulleikin verður loystur við einum nýggjum landsstýrismanni, soleiðis at almannamálini koma at liggja fyri seg hjá Páll á Reynatúgvu.

### 43 ár

Hyggja vit nærri at hesari nýggju landsstýrismanningini, so er kanska tað mest eyðsýnda, at talan er um átta menn, men bert eina kvinnu. Annlis Bjarkhamar, mentamálaráðharri, er einasta kvinnuliga íslettið í nýggja landsstýrið. Hon er samstundis tann yngsta í landsstýrið. Elstur í landsstýrinum er Eyðun Elttør, sum er 61 ára gamal.

Miðalaldurin í Føroya landsstýri er 42,88 ár, sum vit rundað av til 43.

Tá seks av verandi landsstýrismonnum halda fram í starvinum, so merkir tað eisini, at fleiri teirra hava savnað sær royndir í sessinum. Tey trý nýggju í landsstýrinum, Annlis Bjarkhamar, Bill Justinussen og Páll á Reynatúgvu, hava heldur ikki sitið í tílíkum sessi áður.

Tann suverent mest royndi í landsstýrinum er løgmaður, Anfinn Kallsberg. Hann hevur fleiri reisir áður sitið sum bæði fiskimálaráðharri og fíggjarmálaráðharri, og nú er hann sum sagt løgmaður.

Eingin av hinum fimm, sum vórðu sitandi í landsstýrinum, eftir at fólkið hevði talað 30. apríl, høvdu royndir við landsstýrisarbeiði undan 1998. Høgni Hoydal, Eyðun Elttør og Karsten Hansen hava sitið í sessunum í fýra ár á tamb. Jørgen Niclasen og Bjarni Djurholm tóku við, tá ávíkavíst Finnbogi Arge og John Petersen fóru úr starvinum í úrtíð.

Hyggja vit eftir, hvørjar bakgrundirnar eru hjá hesum landsins kosnu, so er tað at siga, at bert Høgni Hoydal hevur eina longri útbúgving frá lærdum háskúla. Hann er cand.comm í søgu og samskifti.

Eyðun Elttør er útbúgvin maskinmeistari. Annlis Bjarkhamar verður skjótt læraraútbúgvin, og tað er Bjarni Djorholm eisini umframt at hava tikið merkonom skeið. Løgmaður hevur handilsútbúgving, og Karsten Hansen er løgreglumaður av útbúgving.

Páll á Reynatúgvu er útbúgving fysioterapeutur. Bill Justinussen og Jørgen Niclasen hava báðir tikið studentsútbúgving. Bill hevur harumframt tikið handilsskúla og HD fyrsta part.

### Nummar tjúgu

Sum nevnt er hatta landsstýrið tað tjúgunda í røðini síðani heimastýrisskipanin varð sett í verk, sambært heimasíðuni hjá løgmansskrivstovuni.

Tær fyrstu nógvu ferðirnar var landsstýrið við skiftandi trimum ella fýra landsstýrismonnum. Við fyrsta landsstýrinum hjá Atla Dam kom so eisini tann fimmti landsstýrismaðurin.

Talan gjørdist so um onkuntíð fimm og onkuntíð seks landsstýrismenn. Ikki fyrr enn í 1991 gjørdis talið á landsstýrismonnum sjey. Við fullveldislandsstýrinum kom talið upp á átta, og nú er talið so voksið til níggju landsstýrismenn.

Stórur munur er á, hvørji málsøkini eru og hava verið. Eitt nú var leingi vanligt, at løgmaður hevði fiskivinnumál, og tað er eisini komið fyri, at løgmaður hevur havt fíggjarmál. Sum heild sæst, at málsøkið í landsstýrinum fylgja nógv við tíðini. Vit hava eitt nú seinastu fýar havt oljumál sum sjálvstøðugt málsøki og sum heild gongur trendurin móti at útgreina hvørt málsøki sær, soleiðis at hvør einstakur landsstýrismaður ræður yvir eina eina longri røð av økjum.

Hóast nógvir menn og nakrar kvinnur hava sitið í landsstýrinum, so slepst ikki undan, at nógv bestu úrtøkuna hevur Atli P. Dam fingið. Øll sjeytiárini umframt nøkur ár í bæði hálvfemsunum og áttatiárunum sat Atli P. Dam sum løgmaður.



Virðisbrævamarknaðurin:

# Funnið samstarvsfelaga

*– Tann tekniski parturin verður klárur í ár. Vit kunnu nú fáa ein marknað, men tað er framvegis soleiðis, at vit ikki hava nøkur viðisbrøv, sigur Sigurd Poulsen, fyribilsstjóri fyri Virðisbrævamarknað Føroya*



**Virðisbrævamarknaður Føroya hevur funnið ein samstarvsfelaga í Íslandi. Nú er næstan klárt at fara ígongd, men enn resta virðisbrøvini í**

VIRÐISBRØV
*Heri á Rógvi*

Tað er sum við hønuni og egginum. Vit hava í Føroyum ein virðisbrævamarknað, sum bíðar eftir virðisbrøvum. Eisini eiga vit fyritøkur, sum bíða eftir einum virðisbrævamarknaði við at gera virðisbrøv.

Tað er mestur heldur ikki orðini Virðisbrævamarknaður í Føroyum, sum fáa tey flestu til at detta av stólinum. Flest øll munnu sita spyrjandi, tí tað er ikki nógv, tú hoyrir um hendan góða marknað.

Virðisbrævamarknaður Føroya (VMF) varð stovnaður 7. november 2000. Partaeigararnir eru býttir í fýra bólkar: fyri útgevarar, fyri íleggjarar, fyri meklarar og fyri myndugleikar. Endamálið er sum navnið sigur, at reka virðisbrævamarknað fyri føroysk virðisbrøv í samstarvi við annan marknað. Hetta við einum øðrum marknað er eisini nakað nýtt. Á aðalfundi 4. juni varð hetta lagt afturat viðtøkunum.

Samstarvsfelagið er eisini ein nýggjheit. Talan er um VerðbréfaÞing Íslands, sum leysliga verður umsett til Virðisbrævamarknaður Íslands.

Fyribilsstjóri fyri føroyska virðisbrævamarknaðin er Sigurd Poulsen. Hann vónar, at teir kunnu fara í holt við at virka innan hetta árið er runnið.

– Tann tekniski parturin verður klárur í ár. Vit kunnu nú fáa ein marknað, men tað er framvegis soleiðis, at vit ikki hava nøkur viðisbrøv, sigur Sigurd Poulsen.

Hetta stigið við at finna ein samstarvsfelaga er at meta sum eitt týðandi stig.

Sigur Poulsen, sum til dagligt er stjóri í Landsbankanum, sigur seg kunnu staðfesta, at áhugin framvegis er til staðar fyri virðisbrævamarknaðinum. Eisini hevur marknaðurin fingið góðar sømdir í nýggja samgonguskjalinum.

Fyribilsstjórin nevnir eisini, at ein partur av fyrireikingunum er at skipa soleiðis fyri, at talan verður elektronisk virðisbrøv ístaðinfyri pappírsbrøv, tí hesi er dýrari at fáast við.

### Samfelagsligan týdning

Tað er heldur ikki at undirmeta, hvønn týdning tað fer at fáa fyri føroyskt vinnulívið tá/um ein virðisbrævamarknaður verður veruleiki.

– Tað vera heilt týðandi broytingar. Fyritøkurnar skulu til at hugsa øðrvísi, og neyðugt verður eitt nú at byggja upp álit við síðnar partaeigarar, sigur Sigurd Poulsen.

Eitt nú kann tað hugsast, at tað ikki longur fer at standa fyritøkum frítt at boða almenninginum frá ymsum, uttan at marknaðurin er kunnaður um hetta áðrenn.

Sigurd Poulsen sær eisini, at fjølmiðlarnir fara at geva hesum nýggja marknaðinum stóran ans við sendingum og nógvari umtalu.

– Í útlondum síggja vit, at marknaðir av hesum slag fáa nógvan umtala, og nógvar sendingar verða sendar um tílíkt. Tað er hugsandi, at hetta gerst eitt stórt millum almenningin sum politikkur, sigur Sigurd Poulsen.

# Nevndin í Arbeiðsgevarafelagnum heldur fram

**Allir tríggir nevndarlimirnir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum stóðu fyri vali, vórðu afturvaldir á aðalfundinum fríggjadagin**

AÐALFUNDUR
*Jan Müller*



*Vilhelm Johannessen afturvaldur til formann í Føroya Arbeiðsgevarafelag*

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðsgevarafelag seinasta fríggjadag stóðu tríggir nevndarlimir fyri vali, og vórðu allir afturvaldir. Nevndin er sostatt tann sama: Vilhelm M. Johannesen, Kristoffur Laksá, Leivur D. Michelsen, Bergur Poulsen, Jóhan Páll Joensen, Magni Arge og Gudmund Mortensen. Eftir fundin skipaði nevndin seg við Vilhelm M. Johannesen sum formanni og Kristoffur Laksá sum næstformanni skrivar Vinnuhúsið á heimasíðuni.

Í ársfrágreiðingin síni segði formaðurin Vilhelm Johannessen m.a.: – Fyri føroysku vinnuna hava seinastu árini verið merkt av áhaldandi størri krøvum um nýskapan og tillaging av virkseminum. Og 2001 var ikki eitt undantak í so máta. Hetta er ein natúrlig fylgja av rembingunum í umheiminum – altjóðagering og rúkandi tøknuligari menning.

Gongdin er ein avbjóðing fyri myndugleikarnar og vinnuna. Karmarnir, sum vinnan virkar undir skulu helst vera støðugir, men hinvegin mugu neyðugar broytingar gerast alt eftir, hvussu umstøðunar broytast. Vinnan krevur tí at stinga út í kortið, um hon skal hava ávirkan á kósina. Arbeiðsgevarafelagið hevur tí eftir førimuni í farna árið roynt at vera rødd vinnurnar, bæði mótvegis myndugleikum, politikarum, fakfeløgum, fjølmiðlum og samfelagnum sum heild segði formaðurin.

FAG og Vinnuhúsið umboða í dag 673 virkir, sum eru limir í feløgunum í Vinnuhúsinum. Av hesum eru 535 limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Farna árið hevur FAG gjørt sáttmálar við flestu løntakarafeløgini. Hesir tryggja vinnuni støðug lønarviðurskiftir eitt 2 til 3 ára skeið.

Vilhelm Johannesen segði, at tað tó má ásannast, at í løtuni er lønarvøksturin her á landi størri enn gott er.

Hann vísti ananrs á, at FAG hevur áhaldandi og leypandi samskifti við myndugleikar og politikarar, fyri at fáa broytingar í lógum og reglum lagaðar til veruleikan hjá vinnuni.

-– FAG hevur farna árið veitt limum sínum víðtøkna hjálp innan nógv ymisk økir. Enn er tað serliga fyrispurningar innan sáttmála- og starvsfólkaviðurskiftir, sum viga tungt. Men spurningar á øðrum økjum, sum leiðslurnar berjast við, eru vaksandi. Eisini hevur felagið farna árið skipað fyri nøkrum kunningartiltøkum og skeiðum serliga ætlað limunum segði formaðurin m.a. í frágreiðiningi.

# Magne Arge formaður í Oljuvinnufelagnum

FORMAÐUR
*Jan Müller*



*Magne Arge formaður í Oljuvinnufelagnum*

Eftir at Oljuvinnufelagið undir Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði aðalfujd 2. mai hevur nevndin nú havt sín fyrsta fund og har skipaði hon seg við Magna Arge sum formanni, meðan Gunvør Balle, Pam Offshore Service, er næstformaður. Hinir limirnir í nevndini eru; Gunnbjørn Joensen, Thor, Árni Joensen, Skipafelagið og Jákup Mikkelsen, Kjølbro Heilsøla. Tiltakslimur er Lassi Borðoy, Atlantic Supply Base. Hetta skrivar vinnuhúsið á heimasíðu síni.